Bjørg Hentze

Fra: Andras Kristiansen
Sendt: 16. marts 2023 10:39
Til: Fíggjarmálaráðið
Cc: Bjørg Hentze
Emne: SV: Hoyringar - Uppskot til broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin)

Opfølgningsflag: Opfølgning
Flagstatus: Afmærket

Fíggjamálaráðið

Viðmerkingar til uppskot um broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap

Veiðigjøldini verða javnað eftir avreiðingarprísinum fyri hvørt fiskaslag sær – størri avreiðingarprísurin, størri verður veiðigjaldið og umvent. Sum kunnugt hava ógvusligar príshækkingar verið á olju seinasta árið. Javningin av veiðigjøldunum tekur ikki hædd fyri slíkum príshækkingum. Hóskandi hevði verið, at munandi broytt útreiðslustøði verður roknað inn í javningina av veiðigjaldinum.

Sambært lógaruppskotinum verður veiðigjald nú eisini lagt á føroysku landingarnar av lodnu. Føroyar hava nógvu seinastu árini einans havt lodnukvotu í íslendskum sjógvi. Áður hava føroysk skip eisini kunna fiskað lodnu bæði í norskum og russiskum sjógvi umframt í Eysturgrønlandi. Viðmerkingarnar her snúgva seg um fiskiskapin í íslendskum sjógvi.

Tíðarskeiðið, sum tað er heimilað føroyskum skipum at fiska lodnu í íslendskum sjógvi, er frá seint á heysti til endan av apríl árið eftir. Vanliga verður fiskað í januar, februar og mars. Kvota verður fyribils sett t.d. í desember. Seinni verða neyvari kanningar gjørdar av stovninum, og ofta verður kvotan hækkað bæði í januar og í februar.

Ivasamt er, um/hvussu lógaruppskotið tekur hædd fyri hesum viðurskiftum, í sambandi við at veiðigjaldið fyri lodnu skal ásetast 15. juli frammanundan, at nøkur føroysk kvota er ásett.

Blíðar heilsanir / Kind regards

Andras Kristiansen
Deildarstjóri/Director
Fartelefon: +298 553241
Andras@fisk.fo

FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Fisheries and Infrastructure

FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ
Yviri við Strond 15 / FO-110 Tórshavn / Føroyar
Tel. +298 353030 / fisk@fisk.fo / www.fisk.fo

Fra: Bjørg Hentze <Bjorg@fmr.fo>
Sendt: 9. marts 2023 16:31
Til: Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; kf@kf.fo; vorn@vorn.fo; stefan@industry.fo; notaskip@notaskip.fo
Cc: Djóni Højgaard <Djoni@fmr.fo>
Emne: Hoyringar - Uppskot til broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin)

Góðan dagin,

Viðheft er uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin). Fíggjarmálaráðið hevur í dag sent uppskotið í almenna hoyring.

Ummælisfreistin er tann 16. mars 2023. Møguligar viðmerkingar skulu sendast til fmr@fmr.fo í seinasta lagi 16. mars 2023 kl. 12.

Vinarliga / Kind regards

Bjørg Hentze
Samskipari / Coordinator
Office: +298 352020
Mobile: +298 552006
bjorg@fmr.fo

FØROYA LANDSSTÝRI
The Government of the Faroe Islands

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance
Tinganes / FO-100 Tórshavn / Faroe Islands
Office: +298 352020 / fmr@fmr.fo / www.fmr.fo